
Torbjørn Kjus, oljugreinari hjá DNB Markets. Mynd: DNB

# Óttast at oljuprísurin verður 30 dollarar fyri fatið

**Jógvan Hugo Gardar**

13.08.2015 - 15:08

Oljan.fo

Oljuprísurin liggur í dag og andøvur um 50 dollarar fyri fatið. Um middasleitið var prísurin fyri Norðsjóvaroljuna Brent 50,14 dollarar fyri fatið, mevan amerikanska lættoljan, WTI, kostaðið 43,36 dollarar fyri fatið.

Tann stóri spurningurin millum greinararnar í dag er ikki verandi oljuprísur, men myrk skýggja á kinverska fíggjarhimmalinum. Niðurskrivingin av kinverksa gjaldoyranum yuan hevur gjørt at dollarin er styrktur mótvegis yuan.

Oljugreinarin Torbjørn Kjus, hjá DNB Markets, sigur í samrøðu við Dagens Næringsliv í dag, at støðan í Kina er sera trupul at tulka. Hann sigur at niðurskrivingin av yuan ger at

kinverjar ikki fara at brúka líka nógva olju komandi tíðina. Hetta leggur trýst á oljuprísin, sum longu er merktur av at nógv olja er á heimsmarknaðinum, og goymslurnar eru á tremur.

Tað er væl hugsandi at oljuprísurin lækkar niður móti 30 dollarum fyri fatið í 2016. Tað er stórur vandi fyri at oljuprísurin kemur at vera munandi lægri enn tað vit hava mett, sum er 65 dollarar í 2016, sigur Kjus.

DNB Markets hevur í síni greining longu mett at kinverjar fara at brúka munandi minni olju komandiu árini. Fyrra hálvár í ár brúkti Kina 400.000 føt av olju um dagin. Áðrenn feskastu niðurskrivingina av yuan metti DNB Markets at Kina í 2017 kemur at brúka 200.000 føt um dagin.

Torbjørn Kjus sigur at ein oljuprísur sum liggur um 30 dollarar fyri fatið kemur at gerast dýrur fyri norska búskapin. Hann heldur ikki at oljuframleivslan steðgar upp, men allar nýggjar íløgur koma at steðga, og stór óvissa verður fyri hvussu framtíðin kemur at vera fyri norsku oljuvinnuna og norska búskapin.